Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Blaðstjóri meldaður fyri harðskap

*Løgreglan skal nú kanna tilburðin týskvøldið, tá kona John Petersen sigur seg verða meiðslað av Dan Klein. Blaðstjórin á Oyggjatíðindi noktar fyri, at hann skal hava gjørt seg inn á hann*

EYÐUN KLAKSTEIN

Ragnhild Petersen, sum er kona John Petersen, fyrrverandi landsstýrismann, hevur meldað blaðstjóran á Oyggjatíðindi, Dan Klein, til løgregluna.

Orsøkin er ein hending týskvøldið, tá kona John Petersen kom á dyr hjá Dan Klein, tí hon ætlaði at tosa við hann um skrivingina um familjuna hjá sær.

– Eg havi eina dóttir, sum líðir undir, at Oyggjatíðindi halda fram við at skriva um okkum, og tí ætlaði eg sum ein mamma at vita, um tað var ein kjansur at tosa við hann um hetta. Men áðrenn eg hevði fingið orðið upp, leyp hann á meg, greiður Ragnhild Petersen frá.

– Eg var fullkomiliga ófyrireikað, at hetta skuldi henda, men eg royndi sum frægast at verja meg.

Sambært Ragnhild Petersen meiðslaði blaðstjórin á Oyggjatíðindi hana, áðrenn hann tveitti hana á dyr. Hon fór á skaðastovuni til kanningar, og eftir tað fór hon beinleiðis á Politistøðina at melda tilburðin.

**Blaðstjóri aðra frágreiðing**

Blaðstjórin á Oyggjatíðindi, Dan Klein, sigur seg einki kenna til, at hann skal hava lopið á konu John Petersen, men hann váttar, at Ragnhild Petersen var á dyr hjá honum týskvøldið.

– Eg havi áður kent meg hóttan av henni, og tí vil eg als ikki hava hana inn til mín. Eg koyrdi hana á dyr, men eg kenni einki til, at hon skal hava meiðslað seg, sigur Dan Klein.

– Síðani visti eg av ongum, fyrr enn eg dagin eftir fekk bræv frá løgregluni um, at eg varð meldaður fyri harðskap. Nú skal eg sjálvandi avhoyrast, tí soleiðis er mannagongdin, men eg kenni einki til, at eg skal hava gjørt meg inn á hana.

Blaðstjórin sigur, at hann nú fer at biða um politiforboð ímóti konu John Petersen.

**Kenna seg illa viðfarin**

Ragnhild Petersen sigur seg vera skelkað av viðferðini Dan Klein gav henni.

– Eg ætlaði bara at fáa ein møguleika at tosa við hann um, at skrivingin hjá honum rakar familjuna hjá okkum meint, men hann leyp á meg, áðrenn eg hevði fingið møguleika at siga míni ørindi, sigur hon.

– Vit kenna okkum fullkomiliga hjálparleys í hesi støðu, vit eru í.

Oyggjatíðindi hava javnan skrivað um málið, eftir at John Petersen varð dømdur, men blaðstjórin heldur onga orsøk verða fyri at leggja hann undir at verða órímiligan í síni skriving.

Familjan hjá John Petersen heldur seg hinvegin verða illa viðfarna í Oyggjatíðindi.

Í næstum fer løgreglan at avhoyra Dan Klein um tilburðin týskvøldið.



# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Skrið ella stormur av suðri, í støðum hvassur stormur. Skýggjað og regn vestaneftir við hita upp í 5 til 8 stig. Seinnapartin støkkur hann vesturum til útsynning við somu vindmegi og hann klárar nakað í, tó ælaveður, og hitin fellur niður móti frostmarkinum.




**Leygardagin:**
Framvegis skrið ella stormur, og í støðum upp í hvassan storm, av suðri og útsynningi við ælaveðri, partvís sum vátaslettings- ella heglingsælingur. Hitin beint oman fyri frostmarkið.




**Sunnudagin:**
Skrið ella stormur av útsynningi, sum hækkar upp í vestan og minkar til andøvsgul upp í ein strúk. Skýggjað við ælaveðri, men út á dagin klárar hann í og tað verður longri millum ælini. Hitin beint oman fyri frostmarkið. Mánanáttina veksur hann aftur vindin av suðri.

**Mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi upp í skrið av suðri, sum seinni støkkur vesturum til útsynning og minkar vindin til andøvsgul uppí ein strúk. Eitt stutt skifti klárt í veðrinum, men sum frálíður skýggjað og regn vestaneftir, men seinast í tíðarskeiðinum klárari við ælaveðri. Hitin millum 3 og 8 stig.




Eitt lágtrýst vestan fyri Lofoten, hvørvur í ein landnyrðingnorðan. Eitt lágtrýst sunnan fyri Hvarvið fer í ein landnyrðineystan, beint sunnan fyri Ísland.




Brúgvaløg haðani við regni, koma framvið Føroyum. Lágtrýstið hevur vind av útsynningi við sær. Tíðliga í næstu viku kemur enn eitt brúgvalag framvið við nógvum vindi og regni.




**Hitalagið mált frá 05./01. kl 06⁰⁰–06./01. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,5°C**
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**




Avfallið: 12,0 mm – **mált frá 05./01. kl 6⁰⁰–06./01. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í januar: 49,4 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | ÷11 |
| Qaqortoq | ÷10 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷4 |
| Seyðisfjørður | ÷3 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 9 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannahavn | 5 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 0 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 10 |
| Malta | – |
| Tunis | 14 |
| Beijing | ÷7 |
| New Dehli | 10 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 33 |

## Vestfalskyrrindi

3. januar: Jørðin næst sólini
4. januar: Mánin longst frá jørðini
6. januar: Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. jan. | 0639 | 1858 | 0539 | 1758 | 0554 | 1813 | 0839 | 2058 | 0939 | 2158 | 0454 | 1713 | 0354 | 1613 | 0654 | 1913 | 0754 | 2013 | 0624 | 1843 | 0739 | 1958 |
| 8. jan. | 0716 | 1935 | 0616 | 1835 | 0631 | 1850 | 0916 | 2135 | 1016 | 2235 | 0531 | 1750 | 0431 | 1650 | 0731 | 1950 | 0831 | 2050 | 0701 | 1920 | 0816 | 2035 |
| 9. jan. | 0752 | 2009 | 0652 | 1909 | 0707 | 1924 | 0952 | 2209 | 1052 | 2309 | 0607 | 1824 | 0507 | 1724 | 0807 | 2024 | 0907 | 2124 | 0737 | 1954 | 0852 | 2109 |
| 10. jan. | 0827 | 2045 | 0727 | 1945 | 0742 | 2000 | 1027 | 2245 | 1127 | 2345 | 0642 | 1900 | 0542 | 1800 | 0842 | 2100 | 0942 | 2200 | 0812 | 2030 | 0927 | 2145 |

fk

Original bosal Útstoyt



ES

p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629



Skorsteins-sóparin
er við til at halda umhvørvið reint

Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar

Andrass á Krossbrekku
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass

Føroya største úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningarevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi fyri besta prísin

FARPACK

P.O. Box 171,
FR-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 314295
Telefax (+298)319107/314968